# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 23. februar 2010, kl. $19^{00}$

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Pauli T. Petersen, Evelyn Gaard, Jón Mikkelsen, Bárður Poulsen og Siri S. Niclassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 73**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um áheitan frá Sp/f Grevstur um at leingja tíðarætlanina til víðkanina av kirkjugarðinum.

Nevndin mælir til at leingja tíðarfreistina við 10 vikum roknað frá 1. januar 2010 treytað av, at kostnaðurin fyri arbeiðið at stúgva grót saman í grótbrotinum í Miðalsbrekku – tilboð frá Sp/f Grevstur upp á 20.000 kr. + mvg – verður gjørt afturfyri dagbøturnar, sum annars høvdu verið, og at dagbøtur annars telja beinanvegin, longda tíðarfreistin er farin.

Um Bygdarráðið tekur undir við tilmælinum, verður skrivlig avtala at gera við Sp/f Grevstur um broytingarnar.

**Viðv. 73**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 74**
Trivnaðar- og umhvørvisnevndin viðgjørdi á fundi tann
15. februar 2010 fyrispurning um luttøku í Earth Hour 2010, sum verður leygarkvøldið
27. mars 2010.

Nevndin mælir Bygdarráðnum til at samtykkja at taka lut í Earth Hour 2010 við at hava gøtuljósini í bygdini sløkt tann tíman.

**Viðv. 74**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 75**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini viðvíkjandi umsókn frá VÍF í sambandi við Bátastevnuna 2010.

Nevndin mælir til at játta tilsamans 20.000 kr. í stuðli til Bátastevnuna.

**Viðv. 75**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 76**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um eftirlit í sambandi við røktarheimsbyggingina.

Fíggjarnevndin mælir til at heita á Landsbyggifelagið um at hava ábyrgdina av eftirlitinum av arbeiðinum at byggja nýtt røktarheim.

**Viðv. 76**
Tilmælið einmælt samtykt.

# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 23. februar 2010, kl. $19^{00}$

**Mál 77**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um jørð- og vegarbeiði í sambandi við røktarheimsbyggingina.

Fíggjarnevndin mælir til at taka av taka av lægsta tilboði upp á alternativ B upp á jørð- og vegarbeiði til nýtt røktarheim.

**Viðv. 77**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 78**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um umsókn frá VÍF um stuðul til Gallaveitslu, sum VÍF skal skipa fyri tann 10. apríl 2010.
J.nr. 2009-257

Fíggjarnevndin mælir til at játta at lána VÍF ítróttarhøllina ókeypis til Gallaveitsluna 10. apríl, umframt reingerðina av høllini eftir brúk, svarandi til kr. 4.000,-.

**Viðv. 78**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 79**
Umsókn um stuðul til 8. mars hald 2010.
J.nr. 2009-035

**Viðv. 79**
Karl A. Olsen, borgarstjóri, skjeyt upp at stuðla 8. mars haldinum 2010 við kr. 4.000.
Tilmælið einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.45.

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Pauli T. Petersen Jón Mikkelsen

Evelyn Gaard Siri S. Niclassen Bárður Poulsen